# Janus Kamban

## afturlítandi framsýning

**LISTASAVN FØROYA**
*21. juni til 13. juli 2003*

Janus Kamban er miðdepilin í føroyskari myndandi list eftir seinna heimsbardaga. Hann skipaði fyri framsýningum, eggjaði øðrum til, var vegleiðarin og álitið hjá heilum ættarliði av listafólki í Føroyum, altíð sannur, altíð høviskur og við tyngd í sínum orðum.

Í øllum verkum hevur Janus Kamban leitað eftir skapi, sum er sterkt og einfalt í senn. Hansara mynda-evni fram um annað er tað vanliga fólkið og gerandislívið, lítillátað og uttan nakran háva, kortini við duldari megi og stórari fynd. Hansara verk er úrslit av drúgvum og áhaldandi vilja at finna inn til tað, sum er føroysk roynd og kensla, og at bera tað fram í myndum loystar úr tíð.

Listasavn Føroya vil takka Janusi Kamban fyri hans-ara stóra og áhaldandi arbeiði føroysku listini at frama.
Listasavn Føroya

# Hondin úr Hellas



Tíðliga stígur Janus av tí traðkaðu gøtuni. Næstrafólkið man onkuntíð ilskast um hansara eginsinni. Men har hjálpa hvørki blíð ella bonsk orð. Eg giti, hann gongur og reikar, smádrongur, millum skøltarnar úti í Bakka ella fram við Eystaruvág, har bryggja verður bygd, og onkur týskur myntur, kanska frá Wallensteins tíð, glitrar í móruni.

Seinni er greitt, at hann longu tá hevði eyguni við sær. Hann fer út í heimin, slítur fjøtur og verður listamaður. Og tó er hann kunnugur við hitt siðbundna. Slekt, dans og vertskap. Hann, tann víðfarni, dugir sum fáur at tosa við heimafólkið, skyldfólk úr Skúgvi ella Húsavík, miðamannin í Havn. Sum er hann dømi um ein dialektikk, har frástøðan førir teg nærri tí sædda og útlegdin nærri tí heimliga.

Í høggmyndini býr andsøgn. Filmur er rørslunnar miðil fram um aðrar. Høggmyndin kveikir lív í eina mentan ella eitt tíðarhvarv. Janus evnar til útróðrarmannin við teggjuni, andbráðan, seyðamannin, fundvísan, Gøtutrónd, skipandi fyri Føroya fyrstu próvtøku. Men steinur ella bronsa hýsa eisini rørslu og fanga viðhvørt, neyvari enn filmur, núið. Og tí myndar Janus eisini dansiringin. Kvøðing og stev savna seg um tað fynduga ørindið, skipari og síðumaður eru sjóleysir, blunda, verða burtur í tamdari bergtøku, riptir úr tíð og stað:

*Onkuntíð á Blálondum*
*tá leikti betur í horni.*

Listin er bærilig, strong, stílførd. Men eystanfyri verður talað um yin og yang. Eisini í grafikki og litprenti sæst tann fasta, reina strikan. Men í tema, litfarra og tolking livnar eitt lýriskt bragd, ein mildleiki, ið er sjónskur, tí hann er óvæntaður, sum bros frá einum orðfáum sjógarpi. Hondin, sum tamdi tær mongu rørslurnar til sublima einfeldi, fegnast nú um mjúkan pollamjørka, gula sólar-renning, krokandi seyð.

Narcissos man vera tíðarinnar merki. Hvør sætar sær og sær seg sjálvan. Men Janus, sum býr í einingi, lurtar, vísir áhuga, gongur sínum næsta á møti uttan fordómar og fær tí vinir víða hvar og langt frá síni starvsgrein. Eisini sínum starvsfeløgum vísir hann áhuga, hóast hansara bersøgnu - men altíð kurteisligu - viðmerkingar neyvan altíð eru væl dámdar. Hann røkir teirra felag og teirra skála. Hann nemur av sínum eintingum kunnleika um list, mentunarsøgu og søgu, um mál og fornfrøði. Hann lærir seg franskt, so hann kann lesa Daudet, France, Camus og Sartre á teirra móðurmáli. Hann ger ferðir til París, Rómaborgar og Akropolis. Og alt hetta, og mangt annað, verður til eina goymslu, har mong anekdotan - fynduga søgd - bíðar eftir barnferð. Hvar finst tað góða lívið? Ikki, mælti Fromm gamli, í ogn, men í *veran*.

Havnin 1913 og Havnin 2003 eru ikki sami býur. Í tíðarslóð daga varðar, av mentunarligum, politiskum og vinnuligum slag. Teirra millum sæst Janusar fatti auto-grafur: relieff og høggmyndir á húsum og torgum. Sum ein heilsan úr Europa. Ella Hellas.

Sum hevur Praxiteles, ella kanska Feidias, biðið ein av sínum næmingum givið høvuðsstaðnum í okkara váta, mjørkasveipta *Ultima Thule* eitt sindur tignarligari høvuðburð.

**Hanus Kamban**

### Fakta

Janus Kamban
listamaður
myndahøggari og grafikari

Føddur í Tórshavn 10. september 1913

Útbúgvin á listaakademiinum í Keypmannahavn 1932-35 og 1938-40,
sum næmingur hjá Einari Utzon-Frank, professara.

Fyristøðumaður í Listaskálanum 1970-1978

Meginverk, sum myndahøggari:
Móðurmálið, minnisvarði fyri
V.U. Hammeshaimb, Tórshavn 1948
Minnisvarði fyri J.P. Gregoriussen, Kvívík 1951
Kvøðarin, andlitsmynd 1951
Minnisvarði fyri teir sjólátnu, Skopun 1954
Søgumaðurin, Kommunuskúlin, Tórshavn 1957
Útróðrarmaðurin, minnisvarði í Vestmanna 1961
Maður og kona, Tórshavn 1972
Tróndur gamli, Gøtu skúli 1976
Jákup Dahl, Vágur 1978
Drongur tekur seyð, Eysturskúlin, Tórshavn 1981
Menn og bátar, Lágargarður, Tórshavn 1988



## NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Minningarorð um Anker Petersen

## f. 18. februar 1926 - d. 14. mai 2003

Hóast eg væl visti, at Anker hevði verið rættiliga sjúkur ta seinastu tíðina, fekk eg ein rættiligan hvøkk, tá eg fekk at vita, at hann var farin, ikki vardi meg, at tað skuldi henda so knappliga, nú hann kendi seg betur, eftir at hava verið innlagdur á Landssjúkrahúsið í nakrar dagar. Tað er torført at ímynda sær, at hann ikki er ímillum okkum longur, tómrúmið er ásýniligt, og saknurin er stórur, fyrst og fremst sjálvandi hjá Rosu, børnunum og abbabørnunum, men eisini hjá okkum øðrum, sum kendu hann og á ymsar mátar høvdu eitt tilknýti til hansara, tí øll vistu vit, at Anker, ja, hann var har, sum hann átti at vera, og hóast tað var ótilvitað, varð hann altíð sjónligur, har hann var, og dugdi at verða skemtingarsamur á sín egna, sermerkta hátt.

Anker var rituvíkingur, sonur Marius og Katrinu Petersen, bæði sonn skilafólk í orðsins rætta týdningi. At Anker var stoltur av sínum uppruna, duldi hann ongantíð fyri. Hann var bersøgin maður og var ikki bangin fyri at siga sínar meiningar bart út og at kalla lutirnar við sínum rætta navni. Hetta kundi stundum fella onkrum fyri brósti, men aftur fyri kundi tú verða vísur í, at tú visti, hvar tú hevði hann, har var einki fals, einki, ið varð krógvað undir borðinum. Soleiðis var Anker, og eg komi í hesum sambandi at hugsa um orðatakið, ið sigur, at tað, sum tú ikki vilt hoyra frá tínum vinum, mást tú hoyra frá tínum óvinum.

Eg minnist væl, fyrstu ferð, eg sá Anker, mundi vera eini 8-9 ára gamal. Tað var eitt kvøldið, eg kom heim, at eg sá Rosu standa uttan fyri húsini undir liðini á einum heldur høgum, breiðvaksnum manni í yvirfrakka og hatti. Ein hábærsligur maður, ið hesin smádrongurin alt fyri eitt fekk virðing fyri, ein virðing, ið ikki gjørdist minni, tá hann seinni, eftir at verða blivin meira húsvandur í heiminum hjá okkum, við hvørt plagdi at koma á motorsúkklu. Eisini minnist ein dagin nøkur ár seinni, tá hann kom at biðja meg hjálpa sær við onkrum í húsunum, sum hann tá var í ferð við at byggja, hvussu stoltur eg gjørdist av, at hann metti mína hjálp verða verda at biða um.

Mong ár seinni, tá Anker aftan á eitt langt tíðarskeið á sjónum, legðist upp á land, gjørdust vit báðir arbeiðsfelagar, og hetta er annað av teimum báðum tíðarskeiðum, eg kom at kenna hann serliga væl. Í hesum arbeiðinum kom hann at ferðast nógv út til tey ymsu arbeiðsplássini, og hann gjørdist skjótt ein føst mynd í tí dagliga virkseminum, eitt slag av felagsnevnara fyri øll arbeiðsplássini, sum ofta vóru spjødd víða um. Arbeiðssamur var hann sum fáur, vildi hava arbeiðið frá hondini bæði skjótt og brátt, onkur mundi halda hann vera í so framfýsnan við hvørt, tá hann hevði hug til at hurta undir, um hann helt tað ganga ov seint fyri seg. Men mangan mundi Anker vera hentur, tá okkurt væntaði, ella amboð og tilfar skuldi flytast ímillum, og ikki var altíð so gott, um ikki fekst fatur á honum, tí hann var upptikin aðra staðni.

Tað seinna tíðaskeiðið, tá vit báðir komu at hava eitt serligt samband við hvønn annan, vóru tey árini, tá hann saman við Rosu tók sær so væl av mammu, eftir at hon var blivin so veik, at hon mátti hava onkran at verða um seg. Tá vísti Anker sítt sanna hjartalag, og ongantíð gloymi eg, hvussu góður hann var við hana, og tað tolsemi, hann sýndi henni. Vit systkini koma altíð at minnast Anker hetta við takksemi, at hann á henda hátt var við til at lætta um hjá mammu, tey seinastu árini, hon livdi, og ikki minst hetta: at uppfylla hennara stóra ynski um at kunna verða verandi hjá einum av sínum børnum. Hesa tíðina fekk eg mangt prátið við Anker, tá eg støkk inn á gólvið, og nú aftaná kennist tað, sum at tá kom eg veruliga at kenna hansara trúfesti og hjartagóðsku, eginleikar, ið hann á ongan hátt roy ndi at rósa sær av ella at gera sjónligar, men tvørtur ímóti vildi gera so lítið burturúr, sum gjørligt. Hesi minnini liva, og tí brúkti Anker lív sítt væl.

Nú okkara stutta summar er í hondum, er Anker farin inn í ævinleikan, har altíð er summar. Hvíl í friði.

**Kristian**

# Bátastevna í Kollafirði fríggjakvøldið



Í sambandi við Sundalagsstevuna sum verður í Kollafirði komandi vikuskifti skipa Kollafjarðar Bátafelag og Kollafjarðar Bjargingarfelag fyri bátastevnu í Kollafirði fríggjakvøldið 20 juni.

Stevnan byrjar kl. 20.00 við bátahylin við Sjógv. Húsini hjá Kollafjarðar Bátafelag og Kollafjarðar Bjargingarfelag hava opið við matsølu og øðrum. Kl. 22.00 verður stevnan sett av Øssuri av Steinum, lærara, í Kollafirði.

Frá kl. 23.00 til 04.00 verður dansur í teltinum við bátahylin, har LM-Band spæla, teir eru kendir frá øðrum tiktøkum, t.d. tá Bátafelagið í Havn skipa fyri bryggjudansi í Vágsbotni. Í samband við dansin koyrir bussur úr Vágsbotni kl. 23.00. Busstúrurin er ókeypis, men dansibilettin verður goldin í bussinum, sum koyrir aftur í Vágsbotn eftir dansin.

### Dagurin

**19. juni. Gervasius,** deyður í umleið 300. Gervasius og bróðirin Protasius vórðu tiknir av døgum í Milano.



Nú blómuhandilin letur aftur 21. juni,
takka vit øllum okkara góðu
viðskiftafólkum hjartaliga
fyri álit og trúðfesti hesa tíðina
vit hava verið á Áarvegnum.

Sp/f Trónd Hansen
Kolbrún Wardum